# IRF-BLAÐIÐ

til miðdeild



Niðurbrótingartíð? Hvat merkir tað?

## Hvar fer alt burturkastið?

Hvat gjørdu føroyingar við ruskið fyrr í tíðini?

Endurvinning

ENDURNÝTSLA

Matoyðsl

Skúlatrøð: Verkstovur við endurnýtslu

SKÁLA SKÚLI – ein grønur skúli

## Hvat merkir tað?

# Niðurbrótingartíð?

Rusk, sum verður blakað út í náttúruna, hvørvur spakuliga ella verður niðurbrotið. Tað er ymiskt, hvussu langa tíð tað tekur. Okkurt tekur bara nakrar fáar vikur, annað tekur fleiri túsund ár.

Smákykt og bakteriur gera, at sumt rusk so líðandi verður niðurbrotið, men tað er trupult at bróta niður rusk, sum náttúran ikki sjálv hevur skapt, sum t.d. plast og glas.

1.000 ár ... brúkar náttúran at bróta niður eina súkklu.

Visti tú, at tað tekur 5 ár at bróta niður eitt tyggigummi, sum tú blakar í náttúruna?

## Hvussu nógv ár, til hetta er burtur?



## Hvat kanst tú gera fyri at minka um rusk í náttúruni?

- Blaka ikki rusk í bø, haga, á sjógv ella á vegin
- Minn onnur á, at tey skulu blaka alt sítt burturkast í ruskiløt
- Um tú sært burturkast sløðast í umhvørvinum, tak tað upp
- Greið øðrum frá, hví tað er týdningarmikið, at vit ikki blaka burturkast í náttúruna



Tað er ólekkurt at lata hundalortar liggja í náttúruni, og tíbetur taka flestu hundaeigarar lortarnar upp. Tað tekur 2 vikur at bróta niður ein hundalort.

Um tú blakar eitt sodavatnsblikk í náttúruna, kunnu ganga 500 ár, til tað er niðurbrotið. Tí er sera týdningarmikið at taka tað upp og lata tað inn sum pant.



Glasfløskur kunnu liggja í náttúruni í upp til 1.000.000 ár.

## Uppgáva:

Hevur tú onnur hugskot til, hvussu tú kanst minka um ruskið í náttúruni?

### Niðurbrótingartíðir hjá ruski, ið verður blakað í náttúruna:

| Hundalortur: | Bananskal: | Avísir og bløð: | Mjólkarpakkar: | Sigarettstubbar: | Tyggigummi: | Proppar úr metali: | Íspinnar: | Plastposar: | Plastfløskur: | Blikk: | Súkklur: | Glasfløskur: |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 vikur | 2–5 vikur | 3–12 mánaðir | upp til 2 ár | 1-5 ár | upp til 5 ár | upp til 100 ár | upp til 10 ár | upp til 500 ár | upp til 500 ár | upp til 500 ár | meira enn 1.000 ár | upp til 1.000.000 ár |





# SKÁLA SKÚLI – EIN GRØNUR SKÚLI

**Seinastu árini hevur Skála skúli arbeitt miðvíst á tí grønu kósini. Tey hava lagt størsta dentin á nærumhvørvið. Skúlan, økið kring skúlan og bygdina, har skúlin er staðsettur. Tey eru á einum máli um, at tey ikki kunnu broyta alt, men øll kunnu vit vera við til at broyta eitt sindur á røttu leiðini.**

### Tilgongdin

Byrjað varð fyri uml. 5 árum síðani at gera eina grøna ætlan fyri Skála skúla, og í 2022 varð ætlanin meira skipað við eini grønari nevnd. Í nevndini eru m.o. Nomi Jacobsen, skúlastjóri, og Emil Jacobsen, sum hevur verið lærari í Skála skúla í 17 ár, og sum nú undirvísir í lærugreinini „Rørsla". Nomi sigur, at tað riggar væl at samantvinna ta grønu leiðina við rørslu, tí tá kunnu børnini vera virkin, samstundis sum tey hugsavna seg um umhvørvið.

Skála skúli er í eini tilgongd, har nakrar mannagongdir eru komnar í fasta legu, aðrar eru á byrjanarstøði, og uppaftur aðrar eru fyri framman.



*Fyri børnini í Skála skúla er grøna ætlanin ein natúrligur partur av undirvísingini. Tey eru m.a. von at rudda væl í bygdini, samla ruskið saman og viga tað. Tann, sum heintar mest rusk, vinnur kappingina.*

Visti tú,
at tað ber til at vitja
IRF á Hagaleiti?
Les meira á irf.fo

### HESI ÁTØK ERU KOMIN Í FASTA LEGU:

- Tey skilja rusk
- Tey framleiða egna mold við bokashi
- Í skúlanum nýta tey ikki einnýtisborðbúnað
- Tey endurnýta pappír og framleiða sítt egna
- Tey seyma innkeypsnet at hava heim við umframt til matvøruhandilin, Skálan
- Tey hava egna eplaveltu, rabarbugarð og ymiskt grønmeti
- Næmingar passa hønur og dunnur hjá skúlanum
- Um várið fara tey á flot, og um heystið fletta tey
- Hvørt ár hava tey eina endurnýtslukafé, har allur peningurin fer til Reyða Kross
- Næmingar fáa undirvísing í burðardygd og sleppa at vitja m.a. IRF og Reyða Kross



*Emil Jacobsen, lærari, og Nomi Jacobsen, skúlastjóri, ganga høgt upp í grønu kósina hjá skúlanum og siga, at tað er týdningarmikið, at bæði leiðsla, starvsfólk og næmingar eru saman um grønu tiltøkini.*

### Byrjanartilgongd við tálg

Tey hava eisini roynt seg við at smelta tálg og gjørt ymiskar royndir við tálgini, m.a. ymisk sløg av sápu, krem og ljós. Okkurt hevur eydnast væl, annað ikki so væl, men lærdómurin liggur í royndunum, sigur Nomi.

### Framtíðarætlanir

„Vit fara at halda fram við okkara grønu ætlan og eisini vísa øðrum á okkara royndir, t.d. við at planta og endurnýta toy. Vit halda, at okkara skúli hevur góðar og drúgvar royndir við burðardygd, og vit vilja fegin geva okkara íkast til ein burðardyggari fólkaskúla. Vit eru tí farin at hava undirvísing fyri børnum á øðrum stovnum.

Okkara vón er, at burðardygd verður sett á tímatalvuna í øllum skúlum í Føroyum. Hetta sera týdningarmikla økið skulu vit taka í álvara. Okkara børn og ungu eru tey, sum skulu bera hetta víðari, tí er sjálvsagt, at hetta skal hava nógv størri pláss í skúlanum," sigur Nomi at enda.






# BOKASHI

### Bokashi fastur táttur á skúlanum

Vit hittu Noru og Eivy Sigvør, ið áttu tørn við bokashi-spannini, sum skuldi tømast í stóra sankutøðskassan uttanfyri. Tær halda, at tað luktar kanska eitt sindur, tá ið tú fæst við bokashi, men tað bilar ikki, tí næmingarnir skiftast um tømingina.

Teimum báðum dámar væl, at teirra skúli hevur nógv tiltøk, sum gagna umhvørvinum.

Tað stuttligasta var at gera krem, sápur og feittstiftir úr tálg.

Eisini er tað ógvuliga stuttligt, at skúlin fleiri ferðir hevur vunnið heiðursløn fyri grønu kósina.








# HVAR FER ALT BURTURKASTIÐ?

**Alt tað, sum tit lata í eitt ruskílat, tá ið tit eru heima, í skúla, til handils ella í høllini, heinta bilarnir hjá IRF. IRF-bilarnir koyra um allar Føroyar eftir ruski frá húsarhaldum, fyritøkum og stovnum.**

## TRØLLAVÍK

Í Trøllavík í Suðuroy hevur IRF eitt móttøkupláss til alt rusk í oynni. Her verður ruskið skilt og goymt, til tað verður sent norður til hinar støðirnar hjá IRF.



## HAGALEITI



### Brennistøð

Á brennistøðini á Hagaleiti uttan fyri Leirvík verða allir teir gráu posarnir frá húsarhaldum brendir, umframt ymiskt annað burturkast, sum vit ikki hava møguleika enn at savna inn til endurvinningar í Føroyum, t.d. blandað burturkast frá ali- og byggivinnu, matleivdir og nógv annað.
Les meira um brenning á síðu 18.

### Endurvinningarhøll

Í endurvinningarhøllina koma allir teir hvítu posarnir frá húsarhaldum, og eisini allar sodavatnsfløskur og -blikk, sum tit selja í handlunum runt í landinum. Her kemur eisini papp og bleytt plast inn frá handlum og virkjum. Les meira um endurvinning á síðu 14–15.

### Oljureinsiverk

Oljureinsiverkið tekur ímóti spillolju og oljudálkaðum vatni frá havnum og skipum.

### Serhøll

Higar koma reyðu posarnir inn, sum tit skilja í heima við hús. Høllin tekur eisini ímóti m.a. øllum elektronikki og serliga dálkandi burturkasti frá vinnu og kommunalum endurvinningarplássum.

## NÝGGJHEIÐAR

Rottangaevja og tyrviburturkast fer til støðina í Nýggjheiðum oman fyri Kvívík. Les meira um tyrving á síðu 19.



## GJÁNOYRI

Jarn, metal, trol, net og trossar fer til Gjánoyrar, har tað verður gjørt klárt til at senda av landinum til endurvinningar.



# Hvat gjørdu føroyingar við ruskið fyrr í tíðini?

IRF varð sett á stovn í 1979, og brennistøðin var tikin í nýtslu í 1989. Men hvat gjørdu vit føroyingar við okkara burturkast, áðrenn hetta? Og hví tók tað 10 ár, frá tí at IRF varð stovnað, til brennistøðin var liðug?






### Burturkastið varð koyrt á sjógv

Við IRF kom ein skipað móttøka og viðgerð av burturkasti í Føroyum, men fyri ta tíð varð alt burturkast í stóran mun blakað á sjógv. Í summum bygdum var vanligt at taka til „Koyr á vestfallið". Hóast mann visti av royndum, at nógv at tí, sum varð koyrt á vestfallið, rak uppaftur aðrastaðni í Føroyum, so høvdu føroyingar ongan annan máta at sleppa av við ruskið. Onkustaðni í Føroyum varð burturkastið koyrt á sjógv, aðrastaðni varð tað koyrt á bukkvald. Summstaðni varð burturkastið brent á bukkvaldi, og so endaðu restirnar á sjónum.

Fyri tey, sum eru uppvaksin við, at ruskið hvørja viku verður heintað beint úr túninum, tykist hetta kanska púra ørt, men fyri 40 árum síðan var hetta tað vanliga at gera.




Hvat er eitt **BUKKVALD**?
Vit siga, at fyrr koyrdu nógvir føroyingar ruskið á bukkvald. Orðið bukkvald merkir ruskpláss. Hesi bukkvald kundu vera í fjøruni, í einum grótbroti e.t.

### Nógv burturkast í havinum og í náttúruni

Í 1970'unum var nógv kjak og politiskt rumbul um at fáa sett á stovn eina brennistøð fyri allar Føroyar. Avbjóðingin var stór við tí nógva burturkastinum, sum endaði í sjónum og í náttúruni sum heild.

IRF varð sett á stovn í 1979. Navnið IRF stendur fyri **interkommunalur renovatiónsfelagsskapur**. Hetta merkir, at IRF er eitt samstarv millum fleiri kommunur um renovatiónina (burturkastøkið).

28 limakommunur eru í IRF, og tað eru allar í Føroyum uttan Tórshavnar kommuna. Tað vil siga, at IRF heintar alt burturkastið í Føroyum, bæði frá privatum húsarhaldum, almennum stovnum, handlum og virkjum, uttan úr økinum hjá Tórshavnar kommunu, sum hevur sína egnu brennistøð.



### Brennistøðin staðsett í Leirvík

Endamálið við IRF var at virka fyri, at burturkast og annað órudd varð beint burtur, so dálking av umhvørvinum steðgaði. Fólk kendu einki til brennistøðir, og m.a. vóru nógvar stúranir um, hvussu dálkandi ein brennistøð mundi vera, og um tað fór at vera vandamikið at búgva nær við o.s.fr. Orsøkin til, at tað gingu tíggju ár, frá at IRF varð stovnað, til brennistøðin varð tikin í nýtslu, var ein ósemja um, hvar í Føroyum brennistøðin skuldi vera. Fyrst skuldi brennistøðin vera á Høganesi á Toftum, síðani skuldi hon byggjast í Hvalvík, men eftir mikið kjak um staðsetingina bleiv semja um at seta brennistøðina á Hagaleiti, sum er smáar tríggjar kilometrar úr Leirvík. Brennistøðin hjá IRF varð tikin í nýtslu í 1989.

# TAÐ BESTA TÚ KANST GERA FYRI UMHVØRVIÐ ER AT MINKA BURTURKASTIÐ

Í dag verður nógv tosað um, at vit skulu keypa burðardygt, framleiða burðardygt og sum heild liva burðardygt. Men hvat merkir tað at liva burðardygt?

Tað merkir, at tú og eg skulu stremba eftir, at okkara liviháttur hevur so lítla ávirkan á náttúruna sum gjørligt, og at slóðin eftir okkum verður so lítil sum gjørligt. Vit skulu ikki brúka so nógv av tí natúrliga tilfeinginum, at náttúran ikki megnar at fylgja við og endurnýggja seg. Sagt við øðrum orðum: Vit mugu ikki fella trøini skjótari, enn tey klára at vaksa.

Hvussu kunnu vit liva burðardygt, tá ið hugsað verður um burturkast?

At hugsa um at blaka minni burt er eitt tað burðardyggasta, sum vit øll kunnu gera, tí tá virða vit tað natúrliga tilfeingið, sum verður hildið í ringrás, samstundis sum vit minka um nøgdirnar av burturkasti, sum skal handfarast víðari.



### Hvat kanst tú gera?

- Minka um ruskið í tínum matpakka (sí síðu 30).
- Far væl um alt tað, sum tú eigur, so tað heldur leingi.
- Lær teg at skyna á, nær tú hevur brúk fyri onkrum nýggjum, og nær tú ynskir tær okkurt nýtt.

### Hvat kunnu tit gera heima?

- Setið 'Ongar lýsingar – takk' á postkassan. (brúkið bera.fo ístaðin).
- Gerið innkeypslistar og matarætlanir.
- Hugsið um matoyðsl (sí síðu 20).
- Latið góðar brúkslutir til endurnýtslu og ikki í ruskílatið.

### Hvat kunnu tit gera í flokkinum/ skúlanum?

- Hugsið um, hvat verður prentað, og prentið/skrivið á báðum síðum.
- Farið væl um bøkur og ognir skúlans, so tær halda leingi.
- Skipið fyri endurnýtslutiltøkum.
- Brúkið endurnýtslutilfar í skúlanum (pappír, gomul klæðir, glaskrukkur).

### Hvat kunnu handlar gera?

- Seta prísin á vørum niður, tá ið vørurnar nærkast síðsta søludegi.
- Keypa vørur inn, sum eru burðardygt framleiddar og helst framleiddar í Føroyum við føroyskari rávøru.
- Minka um søluúrvalið av einnýtisvørum.

## Uppgáva:

Hevur tú okkurt hugskot afturat?



# LAT KLÆÐIR OG LUTIR TIL ENDURNÝTSLU

Tað er sera gott fyri umhvørvið, tá ið vit endurnýta okkara lutir heldur enn at tveita teir burtur, og tað er eisini umhvørvisvinarligari at keypa brúktar lutir í staðin fyri nýggjar.

Vit síggja øll eina rúgvu av lýsingum hvønn dag, ið eggja okkum til at skifta út og keypa nýtt, men tað er sera skilagott at læra seg á at skyna, nær vit veruliga mangla okkurt, og nær vit bert ynskja okkum okkurt nýtt. Sannleikin er tann, at flestu okkara kundu ruddað eina rúgva út heima, uttan at vit høvdu manglað nakað.

Ofta kann tað geva okkum eina kenslu av vælveru og ró at rudda skuffur og skáp heima. Innbúgv, klæðir, leikur, bøkur og byggitilfar, sum tú ikki longur brúkar, kann fara til endurnýtslu. Tú kanst selja lutirnar sjálv/-ur, men tú kanst eisini stuðla vælgerandi felagsskapum við at lata teimum lutirnar.

Endurnýtsla kann eisini vera, at summir lutir fáa eina nýggja nýtslu – t.d. tá ið gomul klæði verða seymað um til nýggj klæði (eisini kallað nýnýtsla).

Við endurnýtslu sparir umhvørvið nógva orku og tilfar, og tú sparir eisini nógvar pengar.

Leita eftir „UPCYCLED CRAFTS/PROJECTS" á netinum og fá nógvan íblástur

## Hugskot til endurnýtslu:

### SEYMING



Á netinum finnur tú alskyns DIY-vegleiðingar um, hvussu tú kanst seyma klæðir og annað burtur úr endurnýtslutilfari. Tú kanst seyma einar gardinur um til einar buksur ella bara brodera blómur á eina blusu fyri at bøta nøkur slithol. Møguleikarnir eru óendaligir, og tað er lætt at geva alskyns lutum eitt hamskifti.

### LOPPUMARKNAÐUR

Kundu tit skipað fyri loppumarknaði á tykkara skúla? So kundu øll, ið høvdu hug, havt ein sølubás við ymiskum lutum. Onkur kundi eisini selt kaffi og køkur. Tá gera tit okkurt gott fyri umhvørvið, samstundis sum tit rudda heima, vinna eitt sindur av peningi og kunnu ogna tykkum nýggjar lutir fyri ein bíligan penga.



Á netinum finnur tú alskyns DIY-vegleiðingar

# TÍTT RUSK KANN FÁA NÝTT LÍV

Alt burturkast, sum ikki kann fyribyrgjast ella endurnýtast, skal latast inn til IRF. Tað er sera týdningarmikið, at hetta burturkastið er rætt skilt, tí alt burturkastið, sum verður latið í tann gráa posan, verður brent og kann tí ikki verða endurvunnið. Tað, sum tit lata í hvíta posan, og størsti parturin av tí, sum tit lata í reyða posan, verður hinvegin sent til endurvinningar.

Glaskrukkur og metalíløt, sum húsarhald kunnu lata inn á kommunalu ruskplássini, verða eisini send til endurvinningar.

Tá ið IRF sendir burturkast til endurvinningar, merkir tað, at IRF sendir tað til virki í øðrum londum. Hesi virki taka sær av at endurvinna tilfeingið úr burturkastinum.

Tað er ymiskt, hvussu ofta ymisk tilfeingi kunnu endurvinnast. Pappír kann endurvinnast 7-10 ferðir, men t.d. glas og jarn kann endurvinnast aftur og aftur, uttan at góðskan versnar.

Papp og pappír kunnu endurvinnast til nýggjar papp- og pappírsvørur, sodavatnsfløskur til nýggjar fløskur, blikk til súkklur o.s.fr.

Í løtuni verður umleið ein triðingur av øllum burturkastinum, sum kemur inn til IRF, endurvunnið. IRF strembar eftir, at í 2030 skulu 50% verða send til endurvinningar.









### Hví er tað so týdningarmikið, at vit endurvinna so stóran part av burturkastinum sum gjørligt?

- Tá ið vit endurvinna burturkastið heldur enn at brenna ella tyrva tað, verður tilfeingið í burturkastinum verandi í ringrás.
- Tað krevur minni orku at framleiða nýggjar vørur burtur úr endurvunnum vørum enn úr nýggjum rávørum.
- Vit spara natúrligt tilfeingi í heiminum.

Visti tú, at alt, sum tú letur í gráa posan, verður brent, og tað, sum fer í hvíta og reyða posa, verður í stóran mun til nýggjar lutir?

# BURTURKASTTRAPPAN

Burturkasttrappan hevur fimm trin: 1. Fyribyrging, 2. Endurnýtsla, 3. Endurvinning, 4. Orkuútvinning og 5. Tyrving.
Tess hægri tú kemur í trappuni, tess betri er tað fyri umhvørvið.




**Trin 1: Fyribyrging**
Tú kanst vera við til at minka um nøgdina av ruski, sum hvønn dag verður koyrt burtur. Hetta gert tú við bert at keypa tað, sum tú veruliga hevur brúk fyri, og sum mest at nýta tað, sum tú hevur, ella møguliga læna frá øðrum. Eisini er týdningarmikið, at tú fert væl um tað, sum tú eigur, so tað kann halda leingi.

**Trin 2: Endurnýtsla**
Tú kanst gleða onnur við at lata leikur, bøkur og klæðir, sum tú ikki brúkar longur, til endurnýtslu.

Tá hjálpir tú umhvørvinum, tí vit sleppa undan at fara út í náttúruna eftir nýggjum tilfeingi at gera nýggjar lutir úr. Øll vaksin og børn kunnu eisini spara pengar, tí tað er bíligari at keypa í endurnýtsluhandlum.

**Trin 3: Endurvinning**
Tá ið vit tosa um at endurvinna burturkast, brúka vit tilfarið í burturkastinum til at gera nýggjar vørur. Eitt dømi um hetta er, tá ið sodavatnsblikk úr aluminium verða gjørd til t.d. súkklur. Tá verður tilfarið í lutinum, sum varð koyrdur burtur, nýtt umaftur, og á henda hátt verja vit umhvørvið, tí vit halda tilfeingið í ringrás.

**Trin 4: Orkuútvinning (brenning)**
Tá ið rusk verður brent, kunnu vit nýta hitan frá brenningini til t.d. at hita onnur hús. Vit kunnu tó bara brenna ruskið eina ferð, og tí er tað betri, um vit brenna minni rusk og heldur hugsa um at fyribyrgja, endurnýta og endurvinna ruskið.

**Trin 5: Tyrving**
Niðasta trin á trappuni er tyrving, og hetta er, tá ið rusk verður grivið niður í jørðina, antin tí tað ikki kann brenna, ella tí at tað er ov skaðiligt at brenna. Tá ið vit tyrva rusk, fáa vit ikki brúkt tilfeingið í ruskinum til nakað. Tyrving er tann minst umhvørvisvinarligi mátin, sum vit kunnu taka okkum av ruskinum, tí arbeiðir IRF við at flyta burturkastbólkar, sum í dag verða tyrvdir, upp eftir trappuni.

PLAKAT

# Hví brenna vit ikki bara alt burturkastið í Føroyum?

Stórur partur av burturkastinum í Føroyum verður brendur. Tá ið vit brenna burturkast, verður tilfeingið í burturkastinum ikki hildið í ringrás, men av tí at vit gagnnýta ein part av hitanum frá brenningini sum fjarhita, fáa vit nyttu burtur úr burturkastinum eina ferð afturat. Hesin fjarhitin er at rokna sum grøn orka.

Tað eru tó fleiri orsøkir til, at vit ikki skulu brenna alt burturkastið í Føroyum. Á síðu 14–15 um endurvinning verður m.a. víst á, at tað er sera týdningarmikið, at vit endurvinna so nógv av okkara burturkasti sum gjørligt, soleiðis at tilfeingið í burturkastinum verður hildið í ringrás. Á henda hátt brúka vit minni av natúrligu rávørunum í heiminum. Harafturat er tað sumt burturkast, sum ikki ber til at brenna, t.d. jarn. Alt tað jarnið, sum endar í ovninum hjá IRF, t.d. blikk, grýtur og gaflar, brennist ikki, men kemur heilt út aftur saman við øskuni. Hetta brenda jarnið má tyrvast saman við øskuni, og tað er ikki gott fyri umhvørvið. Les meira um tyrving á næstu síðu.

Visti tú, at eldurin í brenniovninum á brennistøðin brennur alt samdøgrið mestsum alt árið?

Vert at vita:
Í løtuni verður uml. 60 % av øllum burturkastinum, sum kemur inn til IRF, brent. IRF strembar eftir, at í 2030 skal bert 47 % brennast.

Hóast roykurin verður reinsaður, er hesin roykur framvegis eitt útlát, og tað er ynskiligt, at hetta útlátið er so lítið sum gjørligt. Tað vil siga, at vit ikki skulu brenna slíkt, sum kundi verið endurnýtt ella endurvunnið.

Áðrenn roykurin fer út gjøgnum skorsteinin, verður hann reinsaður fyri ávís dálkandi evni. Tað, sum verður reinsað úr, verður kallað flogøska og er eitt tað mest dálkandi burturkastið, sum vit hava. Tess meira burturkast vit brenna, tess meira flogøsku framleiða vit.




Hitin frá brenningini verður gagnnýttur til at hita bygningarnar rundan um brennistøðina og til framleiðslu á virkinum við síðuna av hjá IRF.

Tess verri burturkastið er skilt, tess meira jarn, glas og annað er í øskuni, og tað merkir størri nøgdir av øsku. Øskan og leivdirnar verða tyrvdar í Nýggjheiðum.





Nógv jarn endar í ovninum hjá IRF, t.d. blikk, grýtur og gaflar. Jarn brennur ikki, so tað kemur heilt út aftur og má tyrvast saman við øskuni. Tí er týdningarmikið at lata jarn inn á endurvinningarplássið, so tað kann verða endurvunnið og ikki brent.

# Tyrving

At tyrva burturkast merkir, at burturkastið verður grivið niður í mold. Sumt burturkast riggar ikki at brenna, og annað er ólógligt at brenna vegna dálkandi útlát, sum hevði staðist av brenning. Í hesum førum er seinasti møguleiki at grava burturkastið niður. T.d. verður gips, bjálving, vesikummur og pvc-rør tyrvt.

IRF tyrvir burturkast á nýggju tyrvimóttøkuni og reinsiverkinum í Nýggjheiðum oman fyri Kvívík.

Tá ið vit tyrva burturkastið, fáa vit ikki gagnnýtt tilfeingið í burturkastinum. Burturkastið verður grivið niður í moldina og verður liggjandi leingi. Okkurt verður spakuliga niðurbrotið í moldini, men sumt verður ongantíð burtur og fer altíð at liggja í moldini.

Í løtuni verður ein lítil partur av øllum tí, sum kemur inn til IRF, tyrvt, men IRF arbeiðir støðugt við at flyta burturkastbólkar, sum í dag verða tyrvdir, upp eftir burturkasttrappuni, soleiðis at tilfeingið í burturkastinum í størri mun kann haldast í ringrás. Málið er, at IRF í 2030 bert tyrvir 3% av burturkastinum.

Visti tú, at øskan frá brenningini eisini verður tyrvd?



## Uppgáva:

Í miðal tekur IRF móti 40.000 tonsum av burturkasti um árið.
Hvussu nógv tons skal IRF í mesta lagi tyrva í 2030, um málið á 3% skal røkkast?

# Matoyðsl

### Hvaðani kemur maturin?

Størsti parturin av matinum, sum vit eta í Føroyum, kemur úr fremmandum londum og hevur ofta ferðast langt, áðrenn hann endar á borðinum hjá tær og mær.

Hóast bert fá sløg av grønmeti og frukt vaksa í Føroyum, kundu vit gjørt meira við tað.

Vit hava bæði seyð og neyt í Føroyum, men kortini innflyta vit nógv kjøt úr øðrum londum.

### Ger matleivdir til mold

Tað ber til at endurvinna matleivdir heima við hús við at lata tær í sokallaðar bokashi-spannir. Bokashi er japanska heitið fyri at súrga matleivdir. Talan er um ein einfaldan hátt at vinna góða, føðslurika mold burtur úr burturkasti, sum annars fer burtur.

Tá ið vit keypa mat frá einum bónda ella útróðrarfólki í Føroyum, hevur maturin ikki ferðast langa leið. Tá siga vit, at maturin er stuttfluttur. Langfluttur matur er matur, sum er framleiddur aðrastaðni og fluttur til landið.

## HVAT KANST TÚ GERA FYRI AT MINKA UM MATOYÐSL?

- Fá tær bert tað upp á borðiskin, sum tú veitst, tú orkar at eta.
- Ver glað/-ur fyri máltíðina, tá ið borðreitt verður við restum.
- Ger ein innkeypslista, áðrenn tú fert til handils.
- Gev tær stundir at kanna, hvat tú eigur inni av mati, áðrenn tú fert til handils.
- Ver mett/-ur, tá ið tú keypir mat, tí tað vísir seg, at tú keypir minni, tá ið tú ert mett/-ur.

## Uppgáva:

Ein kanning hjá IRF vísir, at hvør borgari blakar uml. 1,8 kg av matrestum burtur um vikuna.

**A** Hvussu nógv kilo av matrestum blaka tit burtur heima hjá tykkum um árið?

**B** Hvussu nógv kilo av matrestum blaka tit í flokkinum burtur samanlagt?

Visti tú, at 30–40% av øllum mati í verðini verður ongantíð etin, men fer til spillis ella verður oyðslaður burtur?

### Hví tveita vit mat burtur?

Tú hevur óivað onkuntíð fingið tær meira upp á borðiskin, enn tú orkar at eta. Tú hevur møguliga eisini varnast, at mjólkin í køliskápinum var útgingin. Men hevur tú hugsað um, hvat tað kostar at keypa tann matin, sum endar í ruskspannini? Tú kanst spara nógv, um tú minkar matoyðslið heima, tí matur er dýrur at keypa. Harafturat gert tú umhvørvinum ein beina, tí tað krevur nógva orku at framleiða matvørur og eisini at beina tær burtur.

Visti tú, at umleið helvtin av ruskinum í gráa posa er matur?

### Hvussu brúkar tú matrestir?

Næstan allur matur heldur sær væl til dagin eftir í køliskápi. Tað er altíð spennandi at vita, hvat ber til at fáa burur úr restunum, so tað snýr seg um at brúka hugflogið. Tað finnast annars fleiri góðar uppskriftir á netinum, t.d. á heimasíðuni www.matoydsl.fo, sum tú kanst royna.



# GER TÍTT EGNA MATPAKKAPAPPÍR



### Hetta skalt tú brúka:

- Bummullstoy (t.d. eina gamla t-shirt, avlop av seymitilfari ella tílíkt)
- 25–30 g av bývoksi (kann sum oftast keypast í ítrivshandlum)
- Ein góðan saks
- 2 ørk av bakipappíri
- Strúkijarn og strúkibretti
- Pinsett
- Ein vaksnan at hjálpa til

### Soleiðis gert tú:

1. Máta, strika og klipp eitt toystykki (uml. 20x30cm).
2. Klipp ella sker bývoksið smátt.
3. Legg eitt bakipappírsark á strúkibrettið.
4. Legg toyið slætt á bakipappírið.
5. Stroy bývokspettini javnt út yvir toyið.
6. Legg hitt bakipappírsarkið útyvir.
7. Tendra strúkijarnið og strúk aftur og fram. Tú sært, hvussu bývoksið smeltar og breiðir seg. Alt toyið skal verða undir einum lagi av smeltaðum bývoksi. Tú kanst leggja eyka bývoks á, um tað er neyðugt.
8. Tak ovara bakipappírsarkið omanav.
9. Við pinsett kanst tú varliga loysa toyið frá niðara arkinum og heingja tað upp at torna.
10. Tá ið pappírið er kólnað og tornað, kanst tú nýta tað til matpakkan.

Heimagjørda matpappírið kann vaskast við uppvaskisápu, og tað kann endurnýtast nógvar ferðir.

Legg til merkis: Matpakkapappírini anga eitt sindur av hunangi fyrstu tíðina, men tað gevur ongan smakk í matin.



1



2



3



4



5



6



# FRAMLEIÐSLA AV KLÆÐUM



Nógvar ymiskar rávørur skulu til fyri at framleiða klæðir. Hesar rávørur koma ofta úr ymiskum londum kring heimin, og tískil skulu tær flytast langt við skipi ella flogfari fyri at koma til framleiðslustaðið.

T.d. koma rávørur úr fleiri ymiskum londum, tá ið kovboybuksur skulu framleiðast. Bummull kemur m.a. úr **India**, tráður úr **Saudiarabia**, knappar úr **Peru** og snarlás úr **USA**. Messing, sum verður brúkt til at framleiða knappar og snarlás, kemur úr **Avstralia**, kovboytoyið verður litað í **Týsklandi**, leðurmerkið á buksunum kemur úr **Bangladesh,** og buksurnar verða seymaðar í **Marokko**.

## UPPGÁVA

Finn londini á kortinum og tekna pílar millum øll londini, sum eru partur av framleiðsluni av kovboybuksum.

**INDIA • SAUDIARABIA**
**PERU • USA • TÝSKLAND**
**BANGLADESH • MAROKKO**

## AT HUGSA UM

1. Brúka øll klæðini, sum tú hevur í skápinum
2. Bøt klæðini, um eitt lítið hol kemur á
3. Vaska klæðini eftir vegleiðingini, so tey halda longur
4. Læn og leiga klæðir, um tey bert skulu brúkast eina ferð
5. Být um klæðir við onnur
6. Keyp klæðir í endurnýtsluhandli
7. Keyp bert tað, sum tú veitst, at tú fert at brúka
8. Gev øðrum klæðir, sum tú ikki brúkar longur

# Virðismikla fartelefonin

Tá ið vørur verða framleiddar, verður sera nógv tilfeingi brúkt til vøruna sjálva, men eisini til pakkitilfar og flutning. Summar vørur krevja eisini sera fjølbroytt tilfeingi til framleiðsluna, t.d. krevur framleiðslan av fartelefonini fleiri enn 40 ymiskar rávørur. Flestu av hesum rávørum, sum t.d. gull og kopar, fáast úr námum kring allan heimin.

Menningin av fartelefonum gongur sera skjótt, og tá ið eitt nýtt snið kemur á marknaðin, er freistandi at keypa sær nýggja telefon, hóast okkara telefon riggar væl enn. Vit hugsa ikki um øll ráevnini, sum fara til spillis, hvørja ferð vit keypa nýggja telefon.

Hetta kalla vit tann linjurætta búskapin, sum hevur ein „brúka-og-blaka-burtur" hugsanarhátt.

Tilfeingið á jørðini er ikki óavmarkað, og tí mugu vit broyta okkara hugsanarhátt frá linjurætta búskapinum til ringbúskap. Les meira um ringbúskap á næstu síðu.






## HVUSSU BROYTA VIT FRÁ LINJURØTTUM BÚSKAPI TIL RINGBÚSKAP?

- Vit skulu broyta okkara vanar, so vit keypa minni og umvæla meira
- Fyritøkur skulu umhugsa nýggja sniðgeving og framleiðsluhættir av vørum, so góðskan verður betri, og so minst møguligt av tilfeingi verður brúkt til framleiðslu.

Visti tú,
at hvørja ferð ein fartelefon
á 120 gramm verður framleidd,
hevur hon elvt til umleið 26 kg
av burturkasti, áðrenn hon liggur
í lummanum hjá tær? Hesum
burturkastinum sleppur tú undan,
hvørja ferð tú letur vera
við at keypa nýggja
fartelefon.

**Linjurætti búskapurin, sum vit eiga at flyta okkum burtur frá:**




**Ringbúskapur, sum vit vilja flyta okkum ímóti:**




## Uppgáva:

**A** Tel hvussu nógvar fartelefonir hava verið í tykkara húski seinastu 10 árini
**B** Hvussu nógv kilo av brúktum tilfeingi er tað íalt?

a ☐ b ☐

# SEYMA TÍN EGNA FRUKTPOSA

**Hetta skalt tú brúka:**

- Toy (t.d. eitt gamalt dýnuver, dúk, gardinu ella tílíkt)
- Ein góðan saks
- Seymimaskinu
- Seymitráð
- Eina lissu úr skógvi, band úr gamlari hettutroyggju ella líknandi
- Ein vaksnan at hjálpa til

**Soleiðis gert tú:**

1. Máta, strika og klipp eitt toystykki (uml. 40x30 cm).
2. Seyma 'sikksakk' rundan um allar kantarnar, soleiðis at klæðið ikki trevsar.
3. Falda ein kant ovast (vit fara at toga lissuna ígjøgnum hann seinni). Faldurin skal seymast inn á ranguna á toynum. Seyma faldin.
4. Legg nú toyið í helvt (rangan vendir út). Seyma so botnin á posanum saman og síðani síðuna. Ansa eftir, at tú ikki seymar fyri holið, sum vit skulu toga lissuna ígjøgnum.
5. Klipp allar træðrir.
6. Toga lissuna ígjøgnum.
7. Nú er fruktposin klárur at nýta.

Um tú seymar tín egna posa til frukt og tílíkt, ert tú við til at minka um nýtsluna av einnýtisplastposum, og tað er ordiliga gott fyri umhvørvið.








# HVUSSU ER TÍN MATPAKKI PAKKAÐUR INN?

**Flest øll hava vit matpakkar við okkum í skúla, til frítíðarítriv o.s.fr., men hevur tú nakrantíð hugsað um alt tað óneyðuga ruskið, sum ofta fylgir við matpakkanum?**

**Góð ráð um, hvussu tú kanst minka um ruskið í tínum matpakka:**

- Hav ikki meira mat við, enn tú vanliga etur.
- Nýt mateskjur, ið kunnu endurnýtast aftur og aftur (heldur enn einnýtisinnpakning).
- Brúka so fáar einnýtisplastposar sum gjørligt. Tú kanst t.d. seyma tín egna posa til frukt og tílíkt (sí vegleiðing á síðu 28–29).
- Um tú velur at brúka einnýtisplastposar, minst so til at brúka eina klemmu ella eitt elastikk til posan heldur enn at binda ein fastan knút. So er ikki neyðugt at skræða posan, og sami plastposin kann brúkast fleiri ferðir.
- Best er ikki at nýta silvurpappír. Ístaðin kanst tú nýta bývoks-matpappír, sum kann brúkast nógvar ferðir. Bývoks-matpappír kunnu keypast í fleiri handlum, men tú kanst eisini gera títt heilt egna við hús (sí vegleiðing á síðu 22).
- Hav rosinur, ber, nøtir og tílíkt í smáum íløtum, sum kunnu nýtast aftur.
- Nýt drekkidunk heldur enn sunkist, blikk o.s.fr.
- Hav navn á øllum tínum lutum, so teir koma afturíaftur, um tú gloymir teir eftir í skúlanum ella t.d. í høllini.





*Rebecca Jacobsen, Lea Sommer og Durita Davidsen vísa okkum listaverkið úr klædnapettum.*

# Verkstovur við endurnýtslu

Hóast skúlarnir í Føroyum eru ymiskir í støðd, so kunnu allir skúlar gera okkurt fyri at varpa ljós á burturkast og endurnýtslu.

Í skúlanum á Skúlatrøð í Klaksvík verður á hvørjum vári skipað fyri skapandi evnisdøgum. Seinast var evnið burturkast og endurnýtsla. Fyrst vóru tveir fyrilestrar á skránni, har Gunnhild Dahl Niclasen greiddi frá matoyðsli, og føroyska fyritøkan Ödn Wear greiddi frá, hvussu tey seyma gomul festivaltjøld um til regnklæðir. Síðani vóru tríggjar ymiskar verkstovur á skrá, har næmingarnir kundu læra um endurnýtslu og læra at síggja virði í lutum, sum onnur kanska síggja sum burturkast.

1. verkstova:

## TEPPI ÚR GOMLUM KLÆÐUM

Á hesi verkstovuni gjørdu næmingarnir fyrst vevar úr pappi og tógvi. Síðani kliptu teir gomul klædnapløgg í langar strimlar, sum teir brúktu at veva úr. Allir næmingarnir vóvu hvør sítt petti, síðani vórðu hesi pettini seymað saman til eitt stórt teppi, sum skal heingjast upp í skúlanum.

Til hesa verkstovuna høvdu næmingarnir latið gomul klæðir til skúlan. Klæðir, sum ikki longu kundu brúkast, men sum ikki vóru ov slitin at nýta til okkurt nýtt.

2. verkstova:

## LISTAVERK ÚR KLÆDNAPETTUM

Á hesi verkstovuni brúktu næmingarnir klædna-avlopið frá teppi-verkstovuni og kliptu tað til smáar puntar. Hesir puntarnir vórðu límaðir á eina skitsu av eini mynd av Klaksvíkini og skúlanum. Úrslitið er eitt sera flott listaverk, sum prýðir ein trappuvegg í skúlanum.



### Matarskipan við denti á matoyðsl

Í skúlanum á Skúlatrøð hava tey eina matarskipan, har næmingarnir fáa millummála fyrrapart og seinnapart.

Í køkinum verður sera nógv hugsað um, at eingin matur skal fara til spillis. Til dømis verða gomul breyð gjørd til rugbreyðknas ella músli, nógvur dentur verður lagdur á at keypa stuttfluttar vørur, og hvønn fríggjadag verður borðreitt við avlopi frá vikuni.

*Millummáli á skúlanum við m.a. mairótum úr Dímun*



3. verkstova:

## MINKA UM MATOYÐSL

Á triðju verkstovuni varð sjóneykan sett á matoyðsl, og hvussu vit øll kunnu vera við til at minka um matoyðsl í Føroyum.

Næmingarnir fóru í handlar í býnum og fingu matvørur, sum vóru útgingnar og tí ikki kundu seljast.

Næmingarnir lærdu, hvussu tú sjálv/-ur kanst meta um, hvørt ein matvøra er góð enn, hóast seinasti søludagur er farin. Næmingarnir lærdu eisini, hvussu vit í størri mun kunnu gagnnýta matleivdir, hvussu rukkut frukt kann vera púra góð innan, og hvussu turr breyð kunnu verða snerkt ella brúkt til toast.






PRÁT

## Prát við Rebeccu Jacobsen, Leu Sommer og Duritu Davidsen, sum allar ganga á Skúlatrøð

**Hvør verkstova var tann stuttligasta?**
Tað stuttligasta var at gera mat. Vit gjørdu lekkran toast, og vit skóru frukt, sum smakkaði ordiliga væl, sjálvt um hon sá keðilig út uttaná.

**Halda tit, at tað er týdningarmikið at arbeiða við hesum átøkunum?**
Summi halda, at tað er ordiliga ræst, men ja, vit halda, at tað er sera umráðandi, at vit arbeiða við hesum.

**Eru tit eisini farnar at skilja meira rusk heima, eftir at skúlin hevur lagt størri dent á hetta?**
Ja, tað gera vit. Vit ganga eisini allar til skótar, og har hava vit eisini lært nógv um rusk og endurnýtslu.

Tá ið vit høvdu verið við skúlanum og vitjað IRF, fortaldu vit eisini foreldrunum um allar posarnar, sum vit skulu skilja í. Onkur hevði ongan reyðan posa heima og skundaði sær at bíleggja ein.

**Væntа tit, at tit fara at ganga høgt upp í hetta økið, eisini tá ið tit verða eldri?**
Ja, tað fara vit. Vit fara at læra okkara børn um tað. Nú hava vit eisini lært, at mann ikki skal keypa bara fyri at keypa, men mann skal hugsa seg væl um.

# SPURNAKAPPING

Royn teg nú! Svarini finnur tú ymsastaðni í blaðnum.

IRF





**1. Nær varð IRF sett á stovn?**
1. 1979
2. 1989
3. 1999

**2. Hvat merkir at endurvinna?**
1. At grava niður
2. At geva øðrum
3. At framleiða nýtt burtur úr burturkasti

**3. Hvussu langa tíð tekur tað náttúruni at bróta eitt tyggigummi niður?**
1. Upp til 1 ár
2. Upp til 3 ár
3. Upp til 5 ár







**4. Hvar hevur IRF onga støð?**
1. Í Trøllavík, Suðuroy
2. Í Nýggjheiðum, Kvívík
3. Á Hagaleiti, Leirvík
4. Á Hjalla, Tórshavn

**5. Hvat er tað besta, sum tú kanst gera fyri umhvørvið?**
1. At fyribyrgja burturkasti
2. At brenna burturkast
3. At tyrva burturkast

**6. Ein føroyingur koyrir í miðal ___ kg av matleivdum í ruskílatið hvørja viku.**
1. 0,7 kg
2. 1,1 kg
3. 1,5 kg
4. 1,8 kg





**7. Hvussu nógvar ymiskar rávørur verða nýttar til at gera eina snildfon?**
1. Fleiri enn 20
2. Fleiri enn 30
3. Fleiri enn 40
4. Fleiri enn 50

**8. Hvat av hesum mást tú ikki skola niður?**
1. Hár
2. Vesipappír
3. Kukk

## HVAT KANN BURTURKASTIÐ ENDURVINNAST TIL?

Set strikur millum myndirnar




























# FINN ORÐINI

Í kassanum eru 28 orð, sum hava okkurt við burturkastøkið at gera.
Klárar tú at finna øll? Orðini standa uppeftir, niðureftir, frameftir, aftureftir og á skák.

| | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| A | K | S | Ø | L | F | Ð | Ø | U | R | I | Ð | Æ | L | K |
| L | A | T | E | M | Y | I | G | N | I | E | F | L | I | T |
| M | E | N | D | U | R | N | Ý | T | S | L | A | P | L | A |
| A | E | Y | B | Ð | I | S | E | Y | K | Ú | P | T | A | M |
| I | Æ | L | U | V | B | P | D | Ó | I | T | P | Ð | P | B |
| K | E | J | R | L | I | R | F | Ø | L | L | A | Ø | L | U |
| K | N | Ó | Ð | S | R | E | A | S | J | Á | P | I | U | R |
| A | D | S | A | Ð | G | Y | B | R | A | T | K | N | M | T |
| P | U | P | R | Y | I | D | A | I | Ø | K | Æ | N | H | U |
| T | R | E | D | O | N | Ó | T | Y | R | V | A | K | V | R |
| A | V | R | Y | T | G | S | T | Ú | T | F | L | E | Ø | K |
| M | I | A | G | A | T | S | A | L | P | A | J | Y | R | A |
| S | N | K | D | M | F | N | R | U | S | K | Ó | P | V | S |
| A | N | S | P | A | P | P | Í | R | M | E | A | A | I | T |
| R | A | N | N | E | R | B | T | I | N | R | A | J | Ð | J |

Endurnýtsla
Burðardygd
Umhvørvið
Endurvinna
Fyribyrging
Burturkast
Matpakki
Matoyðsl
Spreydós
Ljóspera
Tilfeingi
Innkeyp
Brenna
Battarí
Klæðir
Fløska
Pappír
Metal
Tyrva
Skilja
Plast
Útlát
Blikk
Papp
Rusk
Vøra
Jarn
IRF





## HVUSSU VIRÐISMIKIÐ ER BURTURKASTIÐ?

Visti tú, at hóast IRF í nógvum førum fær pengar fyri burturkastið, sum verður sent til endurvinningar, so mugu vit hava í huga, at tað kostar fyri IRF at savna burturkastið, at pakka tilfarið og at flyta tað av landinum. Í nógvum førum er tað ein fíggjarlig útreiðsla fyri IRF at senda burturkast av landinum til endurvinningar, men tað er ein stórur umhvørvisligur fyrimunur at endurvinna tilfar – m.a. tí tá spara vit tað natúrliga tilfeingið í heiminum.

### Nú sleppur tú at rokna

1. Seinast, tá ið IRF seldi eina bingju við pappi til eina endurvinningarfyritøku, vigaði bingjan 22.000 kg. IRF fekk 0,52 kr. fyri hvørt kilo frá endurvinningar-fyritøkuni, men mátti gjalda 0,70 kr. fyri hvørt kilo til flutningsfyritøkuna. Hvussu nógv kostaði tað fyri IRF at senda hesa bingjuna við pappi av landinum til endurvinningar?

   **svar:** ____________________

2. Summir burturkastbólkar, t.d. aluminium, fær IRF nógvar pengar fyri. Seinast, tá ið IRF sendi aluminium til endurvinningar, vigaði bingjan 6.000 kg, og IRF fekk heili 9 kr. fyri hvørt kilo. Flutningurin kostaði 2,65 kr. fyri hvørt kilo. Hvussu nógv tjenti IRF upp á aluminiumbingjuna?

   **svar:** ____________________

# HVAT KANN SKOLAST NIÐUR Í VESIÐ?

### Vesið er ikki eitt ruskílat!

Lat ikki køkspappír, skúmklútar, vátserviettar, vattpinnar, bind, tampongir, hár, tanntráð ella líknandi í vesið. Tað kann seta seg fast í kloakkskipanina og gera, at vesið tippist. Tað er bert vesipappír, piss og kukkur, ið eigur at verða skolað niður í vesið. Alt annað skal í ruskílatið.

### Hvar fer pissið og kukkurin?

Tá ið tú hevur verið á vesinum, fer pissið og kukkurin í ein rottanga. Rør, sum liggja undir húsinum, føra pissið og kukkin í ein rottanga, ið tit sjálvi eiga, ella í ein felags rottanga, sum nógv hús eru saman um. Tá ið tangin er fullur, kemur IRF við einum rottangabili og tømir rottangan. Síðan verður evjan koyrd til eitt reinsiverk, sum er í Nýggjheiðum oman fyri Kvívík. Har verður rottangaevjan reinsað og turkað, áðrenn hon verður tyrvd (grivin niður) á einum avsettum øki oman fyri reinsiverkið.

## Uppgáva:

Tak 3 gløs og fyll vatn í. Legg ein vátserviett niður í eitt glas, køkspappír í eitt glas og vesipappír í tað seinasta glasið. Bíða í 6 tímar og rør so við einum gafli. Tá sært tú, at bert eitt av hesum trimum upployst í vatni og er ætlað at skola niður í vesið.